# Shell við nýggjari motorolju

*At skifta motorolju á bilinum skal vera ein uppliving, segði sølu- og marknaðarleiðarin hjá A/S Dansk Shell, Joachim Kappel, í sambandi við at nýggja Shell Helix motoroljan er komin á marknaðin*



**At skifta motorolju á bilinum skal vera ein uppliving, segði sølu- og marknaðarleiðarin hjá A/S Dansk Shell í sambandi við at ein nýggj Shell Helix motorolja er komin á marknaðin**

OLJA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Oljufelagið Shell er komið á marknaðin við einari nýggjari Helix motorolju. Í hesum sambandi var sølu- og marknaðarleiðarin hjá A/S Dansk Shell, Joachim Kappel, í Føroyum og helt skeið fyri starvsfólkum hjá Føroya Shell og teirra kundum. Eisini vóru umboð fyri føroysku bilasølurnar boðin til kunnandi fund um nýggju oljuna, sum hevur verið á marknaðinum í eina tíð.

Shell er heimsins fremsta fyritøka innan motoroljuteknilogi, og teir arbeiða alla tíðina við at betra um oljuna, so hvørt sum nýggju motorarnir verða alt meira framkomnir og krevja eina olju sum smyr og reinsar væl, samstundis sum hon er orkusparandi.

Hetta verður m.a. gjørt í samstarvi við bilverksmiðjurnar og innan motorsportin sum t.d. vælkenda samstarvið millum Shell og Ferrari í Formel 1 koyringini. Samstarvið kemur kundunum til góðar, við tað at oljan verður útviklað og betrað alla tíðini, soleiðis at hon verður alt meira haldgóð, og munandi longri verður millum oljuskiftini.

Á fundi við umboð fyri bilasølurnar greiddi Joachim Kappel frá um nýggju Helix motoroljuna og um týdningin av at skifta motorolju til tíðina og at ansa eftir at nokk av olju er á motorinum. Hann segði m.a. at allir motorar brúka nakað av olju, tí er tað eitt gott hugskot at kanna oljuna við jøvnum millumbili og fylla á, um tað er neyðugt. Hann mælti eisini til, at vit í Føroyum nýta fullsyntetiska motorolju, serliga tí vit koyra ofta stuttar túrar, og tí vit hava so nógva vætu í luftini. Shell Helix Ultra er fullsyntetisk.

Nýggja Shell Heli x motoroljan er eitt tøkniligt gjøgnumbrot. Tað nýggja og slóðbrótandi við hesi oljuni er, at hon

- hevur nýggj íblandingarevni (additiv) sum hava reinsandi ávirkan á motorin
- hon innibyrgir skaðiligt tilfar/skitt, soleiðis at motorurin verður longri reinur (dispergering)
- hevur góðan súrevnisstabilitet, soleiðis at oljan heldur longri
- varðveitir tjúkkleikan betur (viskositetin)

Sambært Shell so kunnu teir dokumentera, at nýggja Helix oljan lýkur øll tey strongu krøv, sum bilframleiðararnir seta til haldgóðsku, orkusparing og umhvørvisvernd. Oljan reinsar, smyr, verjir, kølir og tettur motorin heilt optimalt. Eisini gevur oljan eina javnari motorgongd, samstundis sum motorurin startar betur kaldur.



*Hildigunn Láberg frá Føroya Shell er her við fullsyntetisku oljuni, Shell Helix Ultra*

## Passa betur upp á bilin enn seg sjálvan

**Á fundi við bilasølurnar kom sølu- og marknaðarleiðarin hjá Dansk Shell við eini nýggjari Gallup-kanning sum vísir at:**

75 prosent av donsku bileigarunum kanna motorolju alt ov sjáldan

25 prosent kanna ongantíð motoroljuna

40 prosent av donsku bileigarunum halda, at tað er ringt at velja røttu motoroljuna, og heili 54 prosent av kvinnunum halda tað sama

42 prosent av donsku bileigarunum ásanna, at teir áttu at kanna motoroljuna, men gera tað ikki

Meira enn 25 prosent av bileigarunum eru bangnir fyri at ikki nokk av olju er á motorinum

21 prosent av mannligu bileigarunum passa betur upp á bilin hjá sær enn seg sjálvan. Sama er aldandi fyri 10 prosent av kvinnunum.